


# Interim Report/ Hálvársroknskapur

## H1 2010

TRYGD

www.trygd.fo

# Innihaldsyvirlit / Index

**Leiðslufrágreiðing** . . . . 4
*Management's Report* . . . . 8
**Gongdin seinastu 5 árini /** *5-year financial highlights* . . . . 12
**Rakstrarúrslit /** *Income statement* . . . . 13
**Fíggjarstøða /** *Balance* . . . . 14
**Viðmerkingar til hálvársroknskapin /** *Notes to the financial statements* . . . . 16
**Leiðsluátekning /** *Statement by the management* . . . . 20

**P/F TRYGD TRYGGINGARFELAG**
Gongin 7
Postboks 44
FO 110 Tórshavn
Tel. +298 358100
Fax +298 317211
trygd@trygd.fo
www.trygd.fo
Pf.skr.nr. 8, Tórshavn
V-tal nr. 324.086

# Leiðslufrágreiðing um fyrra hálvár 2010

Fyrra hálvár í 2010 hevur verið nøktandi hjá Trygd.

Samanborið við fyrra hálvár í 2009 er boðað frá fleiri skaðum. Skaðafráboðanirnar hava kortini ikki verið fleiri enn væntað, tí lutfalsliga fáir skaðar og lág skaðaendurgjøld eyðkendu fyrra hálvár í 2009.

Fyrra hálvár í 2010 hevði Trygd 8,2 milliónir krónur í yvirskoti áðrenn skatt. Úrslitið fyrra hálvár í 2009 var 13,0 milliónir áðrenn skatt. Hálvárliga úrslitið eftir skatt er 6,7 milliónir krónur í 2010. Tað var 10,6 milliónir fyrra hálvár í 2009.

Bruttoinntøkurnar frá tryggingargjøldum lækkaðu 2,9 milliónir krónur fyrra hálvár í 2010 og vórðu tilsamans 49,7 milliónir. Lækkingin er stívliga 5,4 prosent. Lækkingin stavar einamest frá vinnuligum tryggingum. Inntøkurnar frá tryggingargjøldum fyri egna rokning lækkaðu 0,2 milliónir krónur. Henda lækkingin er 0,4 prosent samanborið við sama tíðarskeið í fjør.

Útreiðslurnar fyri skaðaendurgjøld fyrra hálvár í 2010 vóru merktar av, at fleiri skaðar vóru enn í 2009. Eisini vóru nakrir heldur stórir brunaskaðar.

Tilsamans vóru útreiðslurnar fyri skaðaendurgjøld fyri egna rokning 26,4 milliónir krónur fyrra hálvár í 2010. Til samanberingar vóru somu útreiðslur 23,1 millión krónur sama tíðarskeið í 2009.

Skaðaprosentið, ið er 66, verður kortini hildið at vera nøktandi fyri fyrra hálvár í 2010. Skaðaprosentið var 59 fyrra hálvár í 2009.

Endurgjaldsburturleggingarnar fyri egna rokning vóru 27,1 millión krónur medio 2010. Hetta var 3,7 milliónir krónur fleiri enn fyrra hálvár í 2009. Hækkingin er avleidd av millum annað tí, at fleiri skaðar hava verið.

Tryggingartekniska úrslitið varð 6,1 millión krónur fyrra hálvár í 2010 samanborið við 10,5 milliónir sama tíðarskeið í 2009. Tryggingartekniska úrslitið versnaði so statt, men tað verður kortini hildið at vera nøktandi.

Fyrra hálvár í 2010 skifti Trygd samleika, eins og felagið fekk nýggja heimasíðu. Harumframt eru íløgur gjørdar í nýggja kt-útgerð. Hetta hevur hækkað rakstrarkostnaðin samanborið við fyrra hálvár í fjør. Kortini verður rakstrarkostnaðurin hildin at vera á nøktandi stigi.

Trygd hevur í høvuðsheitum somu endurtryggingarskrá fyri 2010, sum var galdandi í 2009.

Fíggjarligu inntøkurnar fyrra hálvár í 2010 vóru 2,5 milliónir krónur. Sama tíðarskeið í 2009 vóru tær 3,2 milliónir. Lægri rentustig er høvuðsatvold til inntøkulækkingina. Felagið brúkar varligar íløgumannagongdir, sum eru, at meginparturin av íløgufænum verður settur í lánsbrøv, og at restin verður sett í vanlig avtaluinnlán. Ongar íløgur í partabrøv eru í 2010.

Skatturin av hálvárliga úrslitinum fyri 2010 verður roknaður til 1,5 milliónir krónur.

Tilsamans hevur Trygd rentað eginpening sín 7,7 prosent fyrra hálvár í 2010.

Leiðslan heldur, at úrslitið er nøktandi.

## Marknaðurin

Hørð kapping er millum veitararnar; bæði tá ið tað snýr seg um prís og fulnað. Trygd hevur selt eitt sindur meiri til privat viðskiftafólk. Á vinnumarknaðinum arbeiðir Trygd miðvíst við at menna vinnuøkið. Felagið hevur sett sær fyri at vaksa á hesum øki komandi árini.



Eitt sindur fleiri bilar og sethús eru seld í Føroyum higartil í ár samanborið við hesa tíðina í fjør, men lítið verður selt samanborið við árini frammanundan.

Bilasølan var metlág í 2009. Fyrra hálvár í ár var sølan eitt sindur frægari, tó at fáir bilar framvegis verða seldir. Hetta ger tað truplari at selja biltryggingar. Tó er nøgdin av tryggingum kortini toluliga støðug á hesum virkisøki.

Skaðatryggingarmarknaðurin í Føroyum mennist framhaldandi.

Eftir 1. septembur í 2010 verður føroyski skaðatryggingarmarknaðurin latin upp. Tá kunnu bæði íslendsk og donsk tryggingarfeløg selja tryggingar í Føroyum. At útboðið á marknaðinum kann gerast størri tænir í høvuðsheitum viðskiftafólkunum. Trygd bjóðar nýggjum tryggingarfeløgum vælkomnum.

Samstundis kunnu føroysk tryggingarfeløg at selja tryggingar og tryggingartænastur í Danmark. Í løtuni hevur Trygd ongar ítøkiligar ætlanir um at virka í Danmark í 2010.

Bruttoinntøkurnar frá tryggingargjøldum eru allar forvunnar í Føroyum.

## Menning felagsins

Trygd arbeiðir uttan íhald við at menna og varðveita kappingarført tryggingarvirksemi. Felagið roynir at hava útreiðslurnar á ráðiligum stigi, og starvsfólkini verða alsamt ment og útbúgvin til at geva viðskiftafólkunum bestu ráðgeving og tænastu, ið kann vera við til at tryggja, at felagið mennist. Týdningarmikil partur av hugtaki okkara er, at viðskiftafólkini framhaldandi fara at hava álit á okkum, og at vit tryggja góða kapping á skaðatryggingarmarknaðinum, uttan at dygdin svíður fyri tað.

Leiðslan heldur, at Trygd stendur væl fyri á føroyska tryggingarmarknaðinum.

Fyrra hálvár í 2010 vóru í miðal 23 heiltíðarstørv í Trygd. Sama tíðarskeið í fjør vóru tey 22.

## Eginogn og solvensur

Tann 30. juni í 2010 var eginognin 90,2 milliónir krónur. Partapeningin, ið er 40 milliónir krónur, eigur P/F BankNordik (Føroya Banki).

Trygd boðaði fyrstu ferð í mars í 2010 Tryggingareftirlitinum frá einsæris solvensi. Uppgerðin um einsæris solvens, ið er neyðug fyri rakstur felagsins, er munandi lægri enn bókaða eginogn felagsins. Hetta vísir, at solvensurin er lutfalsliga gott.

## Væntan um tað, ið eftir er av 2010

Leiðslan væntar, at umsetningurin verður toluliga støðugur seinna hálvár í 2010.

Harða kappingin millum tryggingarfeløgini um prís og treytir fer helst at halda fram.

Íløgan, ið móðurfelagið hevur gjørt í íslendskt tryggingarvirksemi, fer valla at ávirka tað, ið Trygd væntar um restina av árinum. Tó verður hildið, at samstarvið millum systurfeløgini fer at styrkja yrkisliga grundarlagið undir tryggingarvirkseminum.

Tað verður ikki væntað, at tær íløgur, sum móðurfelagið hevur gjørt í bankadeildir í Danmark og Grønlandi, fara at ávirka rakstrarroknskapin hjá Trygd fyri seinna hálvár stórvegis.

Trygd væntar, at inntøkurnar fyri seinna hálvár verða á sama stigi, og felagið væntar framvegis, at ætlaða nettoúrslitið fyri alt árið 2010 verður umleið 10-14 milliónir krónur.

At eginogn felagsins 30. juni í 2010 var 90,2 milliónir krónur verður hildið at vera nøktandi fyri virksemið hjá Trygd í 2010.

## Grundarlagið undir hálvársfrágreiðingini

Roknskapurin er gjørdur sambært kunngerð nr. 2 frá 30. desembur 2009 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum.

Nýtti roknskaphátturin, ið varð lýstur undir brotinum um roknskaparhættir í ársfrágreiðingini fyri 2009, er óbroyttur. Undantikin eru tó viðurskiftini niðanfyri, har nýggj lóggáva hevur kravt broytingar.

Broytingarnar koma í kjalarvørrinum av nýggjum roknskaparreglum í kunngerðini um fíggjarligar frágreiðingar frá tryggingarfeløgum. Broytingar eru framdar innan hesi øki:

1. útreiðslur fyri skaðaviðgerð í sambandi við skaðatilburðir,
2. útreiðslur í sambandi við, at tryggingarsáttmálar verða útvegaðir og endurnýggjaðir,
3. avsetingarpartin hjá endurtryggjarunum,
4. virðismeting av fastari ogn.

Útreiðslur fyri skaðaviðgerð, ið áður vórðu bókaðar undir fyrisitingarkostnaði, verða nú knýttar at sjálvum skaðanum. Sambært hesum roknskaparbroytingum lækkaði fyrisitingarkostnaðurin fyrra hálvár 2010 við 3,5 milliónum krónum, eins og útreiðslurnar fyri skaðaútgjøld hækkaði samsvarandi (30.06.2009 eru somu postar rættaðir við 2,6 milliónum ávikavist).

Mettar útreiðslur fyri skaðaviðgerð frameftir (í sambandi við hendar skaðar) gjørdu, at burturleggingarnar 30.06.2010 hækkaðu við 2,2 milliónum krónum.

Tær útreiðslur, ið eru knýttar at tí at fáa og endurnýggja okkara part av tryggingarsáttmálunum, eru fluttar frá umsitingarútreiðslum til útveganarútreiðslur. 30.06.2010 eru 2,7 milliónir fluttar, og 30.06.2009 eru 2,1 millión fluttar.

Parturin av endurgjaldsburturleggingunum hjá endurtryggjarunum verður ikki longur mótroknaður í burturleggingunum, men verður settur sum ogn. Henda broytingin í roknskaparhættum hevur merkt, at bæði ogn og skuld hækka 1,1 millión krónur 31.12.2010 og 1,3 milliónir krónur 31.12.2009.

á næstu síðu er frágreiðing um skiftið til nýggjan roknskaparhátt viðvíkjandi eginogn og úrsliti primo 2009, 30. juni 2009, og ultimo 2009:

| DKK 1.000 | Eginogn Primo 2009 | Úrslit 2009 | Eginogn Ultimo 2009 |
|---|---|---|---|
| **Roknskaparháttur frá 2009** | **70.728** | **24.008** | **82.736** |
| Hækking í fastari ogn | 1.016 | -4 | 1.012 |
| Broyting í útsettum skattaognum | -228 | -45 | -182 |
| Broyting í endurgjaldsburturleggingum | 47 | -94 | -47 |
| Broyting í vinnufelagsskatti | -52 | 18 | -34 |
| **Broytingar tilsamans** | **784** | **-126** | **749** |
| **Roknskaparháttur frá 2010** | **71.512** | **23.882** | **83.485** |

| | Eginogn Primo 2009 | Úrslit 30. jun. 2009 | Eginogn 30 Jun. 2009 |
|---|---|---|---|
| **Roknskaparháttur frá 2009** | **70.728** | **10.481** | **81.209** |
| Hækking í fastari ogn | 1.016 | -2 | 1.014 |
| Broyting í útsettum skattaognum | -228 | 0 | -228 |
| Broyting í endurgjaldsburturleggingum | 47 | 202 | 249 |
| Broyting í vinnufelagsskatti | -52 | -36 | -88 |
| **Broytingar tilsamans** | **784** | **164** | **947** |
| **Roknskaparháttur frá 2010** | **71.512** | **10.645** | **82.156** |

**Onnur viðurskifti**

Eftir 30. juni 2010 er einki hent, ið ávirkar fíggjarligu ella handilsligu støðu felagsins.

# Management's Report – First half of 2010

Trygd generated a satisfactory performance in the first half year of 2010.

The company had more claims events than in the first half of 2009, but no more than could be expected, as claims expenses in H1 2009 were relatively small and few in number.

TRYGD reported a pre-tax profit of DKK 8.2m in H1 2010, against DKK 13.0m in H1 2009. The profit after tax was DKK 6.7m in H1 2010, against DKK 10.6m in H1 2009.

Gross premium income fell by DKK 2.9m in H1 2010 to DKK 49.7m, a drop of around 5.4%. The decline derived mainly from commercial accounts. Premium income net of reinsurance fell by DKK 0.2m, a 0.4% drop relative to the year-earlier period.

The H1 2010 claims expenses were based on a larger number of claims relative to 2009 as well as a few major fire claims.

Claims incurred, net of reinsurance, totalled DKK 26.4m in H1 2010, relative to DKK 23.1m in H1 2009.

Nevertheless, the H1 2010 claims ratio of 66 is considered to be acceptable. The H1 2009 claims ratio was 59.

Provisions for claims, net of reinsurance, amounted to DKK 27.1m at 30 June 2010, an increase of DKK 3.7m relative to 30 June 2009. The increase was due in part to the higher number of claims.

The technical result was DKK 6.1m in H1 2010 compared with DKK 10.5m in H1 2009. Although the technical result thus declined, it is still considered satisfactory.

Trygd presented a new graphic identity and launched a new website during the first half year. In addition, the purchase of new IT servers increased operating costs relative to the year-earlier period, but these costs are still considered to be at a satisfactory level.

Trygd's reinsurance program for 2010 is largely unchanged from 2009. Trygd has retained a relatively high retention rate.

Financial income amounted to DKK 2.5m in H1 2010, against DKK 3.2m in H1 2009. Lower interest rate levels are the main reason for the drop in financial income. The company pursues a prudent investment policy, according to which most of the investable funds are placed in bonds and the rest as fixed-term deposits. The company held no equity investments in 2010.

Tax on the income for the first half year has been calculated at DKK 1.5m.

Overall, Trygd generated a return on equity of 7.7% in H1 2010.

Management considers the financial results for the period to be satisfactory.

## The market

There is fierce competition among providers – in terms of prices as well as coverage. Trygd achieved a moderate improvement in sales to private customers. Trygd is dedicated to developing the commercial market and aims to grow this market in the years ahead.

Sales of cars and single-family homes in the Faroes improved slightly over last year, but are still at a low level compared with previous years.



New car sales reached a low point in 2009. Although car sales picked up somewhat in H1 2010, the current level remains low, restricting business opportunities within motor insurance. Trygd's portfolio of motor insurance policies is relatively stable, however.

The non-life insurance market in the Faroe Islands is constantly evolving.

The Faroese non-life insurance market will be opened to Icelandic and Danish insurance companies effective from 1 September 2010. As a general rule, having a greater supply in the market benefits the customers, and Trygd welcomes prospective new insurance providers.

Concurrently with this change, Faroese insurance companies will be permitted to sell insurance products and services in Denmark. Trygd has no current plans to launch business operations in Denmark in 2010.

All gross premiums were earned in the Faroe Islands.

## Company developments

Trygd works continuously to develop and maintain a competitive insurance business. We focus on maintaining costs at a reasonable level and on keeping the qualifications of our employees up to date, enabling them to advise and serve our customers in the best possible way in order to generate solid and healthy growth rates for the company. An important aspect of our concept is to maintain our customers' trust and ensure healthy competition in the non-life insurance market without compromising quality.

Management believes that Trygd holds a sound business position in the Faroese insurance market.

In H1 2010, Trygd had an average of 23 employees (full-time equivalent), against 22 in H1 2009.

## The company's capital structure and solvency

Shareholders' equity amounted to DKK 90.2m at 30 June 2010. The share capital of DKK 40m is wholly owned by P/F BankNordik (Føroya Banki).

Trygd submitted the initial report on its individual solvency ratio to the Tryggingareftirlitið in March 2010. The calculated individual solvency required for the company's current operations is substantially lower that the company's shareholders equity, confirming the company's relatively strong financial position.

## Outlook for the rest of 2010

Management anticipates relatively stable revenue flows in the second half of 2010.

The sharp competition among existing providers is expected to persist with respect to prices as well as terms and conditions.

The parent company's investment in insurance business in Iceland is not expected to influence Trygd's outlook for the rest of the year. On the other hand, collaboration between the sister subsidiaries is expected to enhance the professional platform for Trygd's insurance operations.

The parent company's other investments in banking branches in Denmark and Greenland are not expected to have any material effect on Trygd's operations in H2 2010.

Earnings are expected to be at an unchanged level in H2 2010, and the company retains the guidance for full-year net profit of around DKK 10-14 m.

Equity of DKK 90.2m at 30 June 2010 is considered satisfactory in view of Trygd's operations in 2010.

## Basis of preparation of the H1 financial statements

The interim financial statements have been prepared in accordance with Executive Order No. 2 of 30 December 2009 on financial reports presented by insurance companies.

The accounting policies applied are set out in Annual Report 2009 and are unchanged other than as set out below, such changes being due to amended legislation.

The changes have been made in reference to the new accounting rules provided by the Executive Order on financial reports presented by insurance companies and apply to the following four areas:

1. Claims handling costs relating to claims incurred
2. Costs relating to the acquisition and renewal of the portfolio of insurance contracts
3. Reinsurers' share of provisions
4. Valuation of real property.

Claims handling expenses incurred reduced administrative expenses and increased claims paid by DKK 3.5m at 30 June 2010 (comparative figure at 30 June 2009 adjusted by DKK 2.6m).

Estimated future claims handling costs relating to claims incurred increased provisions by DKK 2.2m at 30 June 2010.

Operating expenses relating to insurance activities
The expenses related to acquiring and renewing the portfolio of insurance contracts have been transferred from administrative expenses to acquisition costs. DKK 2.7m was transferred at 30 June 2010 compared with DKK 2.1m at 30 June 2009.

Reinsurers' share of claims provisions is no longer offset against provisions, but is recognised as an asset. This change in accounting policy increased assets as well as equity and liabilities by DKK 1.1m at 30 June 2010 and by DKK 1.3m at 31 December 2009.

Statement of changes to equity and financial results at 1 January 2009, 30 June 2009 and 31 December 2009 on transition to new accounting policies

| DKK 1.000 | Equity 1 January 2009 | Profit/loss 2009 | Equity 31 December 2009 |
|---|---|---|---|
| **Accounting policies applied in 2009** | **70.728** | **24.008** | **82.736** |
| Revaluation of real property | 1.016 | -4 | 1.012 |
| Change in deferred tax assets | -228 | -45 | -182 |
| Change in outstanding claims provisions | 47 | -94 | -47 |
| Change in income tax | -52 | 18 | -34 |
| **Change overall** | **784** | **-126** | **749** |
| **Accounting policies applied in 2010** | **71.512** | **23.882** | **83.485** |

| | Equity 1 January 2009 | Profit/loss 30 June 2009 | Equity 30 June 2009 |
|---|---|---|---|
| **Accounting policies applied in 2009** | **70.728** | **10.481** | **81.209** |
| Revaluation of real property | 1.016 | -2 | 1.014 |
| Change in deferred tax assets | -228 | 0 | -228 |
| Change in outstanding claims provisions | 47 | 202 | 249 |
| Change in income tax | -52 | -36 | -88 |
| **Change overall** | **784** | **164** | **947** |
| **Accounting policies applied in 2010** | **71.512** | **10.645** | **82.156** |

**Other information**

No events have occurred since 30 June 2010 which are of material significance to the company's financial or operating position.

# Gongdin seinastu 5 árini / 5-year financial highlights

## Høvuðstøl / key figures

| DKK 1.000 | 1. hálvár 2010 | 1. half year 2009 |
|---|---|---|
| Tryggingargjøld, / *Premiums written* | 43.390 | 44.052 |
| Útgoldin skaðagjøld, / *Claims paid* | -26.191 | -22.395 |
| Rakstrarútreiðslur av trygging / *Total insurance operating expenses* | -9.000 | -8.263 |
| Úrslit av endurtrygging / *Profit/loss on business ceded* | -2.508 | -3.583 |
| **Fyri egna rokning** / *Net of reinsurance* | | |
| Tryggingargjøld f.e.r. / *Earned premiums, net of reinsurance* | 40.760 | 40.927 |
| Tryggingarteknisk renta f.e.r. / *Technical interest, net of reinsurance* | 391 | 682 |
| Skaðagjøld f.e.r. / *Claims incurred, net of reinsurance* | -26.403 | -23.124 |
| Rakstrarútreiðslur av trygging f.e.r / *Total insurance operating expenses, net of reinsurance* | -8.665 | -7.991 |
| **Tryggingarteknískt úrslit / *Technical result*** | **6.083** | **10.494** |
| Úrslit av íløguvirksemi / *Return on investment activities* | 2.096 | 2.488 |
| **Hálvársúrslit / *Profit for the half year*** | **6.706** | **10.645** |
| Úrslit av endurgjaldsavsetingum / *Run-off gains/losses* | 1.928 | 155 |
| Úrslit av endurgjaldsavsetingum f.e.r. / *Run-off gains/losses, net of reinsurance* | 1.552 | -500 |
| **Fíggjarstøða / *Balance sheet*** | | |
| Tryggingartekniskar avsetingar / *Technical provisions* | 59.976 | 56.610 |
| Tryggingaráogn tilsamans / *Total Technical assets* | 1.148 | 1.518 |
| Eginogn tilsamans / *Total Equity* | 90.191 | 82.156 |
| Grundkapitalur / *Base Capital* | 90.162 | 82.140 |
| Solvensdekningur / *Solvency Coverage* | 23.836 | 23.825 |
| Áogn tilsamans / *Total Assets* | 167.658 | 155.105 |
| **Lyklatøl / *Ratios*** | | |
| Endurgjalds %, brutto / *Claims percent, brutto* | 60,4 | 50,8 |
| Endurtryggingar %, netto / *Net reinsurance ratio* | 5,8 | 8,1 |
| **Tilsamans / *Total*** | **66,1** | **59,0** |
| Bruttokostnaðar % / *Gross expense ratio* | 20,7 | 18,8 |
| Combined Ratio / *Combined Ratio* | 86,9 | 77,7 |
| Operating Ratio / *Operating Ratio* | 86,1 | 76,5 |
| Lutfalsligt úrslit av endurgjaldsavsetingum brutto / *Relative Run-off gains/losses, brutto* | 8,2 | 0,7 |
| Lutfalsligt úrslit av endurgjaldsavsetingum f.e.r. / *Relative Run-off gains/losses, net of reinsurance* | 6,9 | -2,4 |
| Eginognsavkast í % / *Return on Equity, %* | 7,7 | 13,9 |
| Solvensdekning / *Solvency Coverage* | 3,8 | 3,4 |

# Rakstrarúrslit / Income statement

| | DKK 1.000 | 1. hálvár 2010 | 1. half year 2009 |
|---|---|---|---|
| 1 | Tryggingargjøld, brutto / *Gross premiums written* | 49.740 | 52.590 |
| | Latin endurtryggingargjøld / *Ceded insurance premiums* | -3.086 | -3.676 |
| 1 | Broyting í avsetingum til tryggingargjøld / *Change in gross provisions for unearned premiums* | -6.351 | -8.538 |
| | Broyting í endurtryggingarparti av avsetingum til tryggingargjøld / *Change in reinsurers' share of provisions for unearned premiums* | 456 | 551 |
| | **Tryggingargjøld f.e.r. / *Earned premiums, net of reinsurance*** | **40.760** | **40.927** |
| 2 | **Tryggingarteknisk renta f.e.r. / *Technical interest, net of reinsurance*** | **391** | **682** |
| | Útgoldin skaðagjøld, brutto / *Claims paid* | -24.716 | -21.593 |
| 1 | Endurgoldið frá endurtryggingingini / *Reinsurance recoveries* | 354 | 826 |
| | Broyting í avsetingum til skaðagjøld / *Change in gross provisions for claims* | -1.474 | -802 |
| 1 | Broyting í endurtryggingarparti av avsetingum til skaðagjøld / *Change in reinsurers' share of gross provisions for claims* | -566 | -1.555 |
| | **Skaðagjøld f.e.r. / *Claims incurred, net of reinsurance*** | **-26.403** | **-23.124** |
| | Fyrisitingarútreiðslur / *Administrative expenses* | -5.960 | -6.111 |
| | Tekningarútreiðslur / *Acquisition costs* | -3.040 | -2.152 |
| 1 | Provisiónir frá endurtryggingum / *Commission from reinsurers* | 334 | 272 |
| 3 | **Rakstrarútreiðslur av trygging f.e.r / *Total insurance operating expenses, net of reinsurance*** | **-8.665** | **-7.991** |
| | **Tryggingartekniskt úrslit / *Technical result*** | **6.083** | **10.494** |
| | Inntøkur av fastari ogn / *Income from real property* | -16 | -72 |
| 4 | Rentur og vinningsbýti v.m. / *Interest and dividends, etc.* | 1.804 | 2.648 |
| | Virðisjavnan av íløguognum / *Value adjustments of investment assets* | 699 | 594 |
| | **Inntøkur av íløguognum / *Income from investment assets*** | **2.487** | **3.170** |
| 2 | **Flutt til tryggingartekniska rentu / *Transferred to technical interest*** | **-391** | **-682** |
| | **Úrslit av íløguvirksemi / *Return on investment activities*** | **2.096** | **2.488** |
| | **Úrslit undan skatti / *Profit before tax*** | **8.178** | **12.981** |
| 5 | **Skattir / *Tax*** | **-1.472** | **-2.337** |
| | **Hálvársúrslit / *Profit for the half year*** | **6.706** | **10.645** |

# Fíggjarstøða
# Balance sheet

| | DKK 1.000 | 30. jun. 2010 | 31. dec. 2009 |
|---|---|---|---|
| | **Ogn / Assets** | | |
| 6 | Rakstrargøgn / *Operating equipment* | 672 | 500 |
| 7 | Bygningar / *Real property* | 1.990 | 1.992 |
| | **Materiell ogn í alt / *Total Tangible Assets*** | **2.662** | **2.492** |
| | | | |
| 8 | Lánsbrøv / Bonds | 53.880 | 50.189 |
| | **Íløguognir í alt/ Investment assets** | **53.880** | **50.189** |
| | | | |
| | Endurtryggjaranna partur av avsettum tryggingargjøldum / *Reinsurers' share of provisions for unearned premiums.* | 698 | 241 |
| | | | |
| | Endurtryggjaranna partur av avsetingum til endurgjøld / *Reinsurers' share of provisions for unpaid claims.* | 450 | 1.016 |
| | **Endurtryggjaranna partur av avsetingum til tryggingaravtalur í alt / *Total reinsurers' share of provisions for insurance contracts*** | **1.148** | **1.257** |
| | | | |
| 9 | Áogn hjá tryggingartakarum / *Receivables from policyholders* | 8.514 | 15.528 |
| 10 | Áogn hjá tryggingarfeløgum / *Receivables from insurance companies* | 0 | 308 |
| 11 | Onnur áogn / *Other receivables* | 7 | 7 |
| | **Áogn í alt / *Receivables*** | **8.522** | **15.844** |
| | | | |
| 11 | Útsett skattaogn / *Deferred tax assets* | 29 | 29 |
| | Tøkur peningur / *Cash and cash equivalents* | 99.978 | 98.627 |
| | **Aðrar ognir í alt/ *Other assets*** | **100.007** | **98.656** |
| | | | |
| | Rentur tilgóðar / *Interest receivable* | 501 | 1.389 |
| | Aðrar tíðarmarkinger / *Other prepayments and accrued income* | 938 | 1.019 |
| | **Tíðaravmarkingar í alt / *Prepayments*** | **1.439** | **2.408** |
| | | | |
| | **Ognir tilsamans / *Total assets*** | **167.658** | **170.847** |

| | DKK 1.000 | 30. jun. 2010 | 31. dec. 2009 |
|---|---|---|---|
| | **Skuld / *Equity and liabilities*** | | |
| | Partapeningur / *Share capital* | 40.000 | 40.000 |
| | Framflutt úrslit / *Retained earnings* | 50.191 | 43.485 |
| 12 | **Eginpeningur / *Equity*** | **90.191** | **83.485** |
| 13 | Avsett til tryggingargjøld / *Gross provisions for unearned premiums* | 32.841 | 26.538 |
| | Avsett til endurgjøld / *Gross provisions for claims* | 27.135 | 23.416 |
| | **Tryggingartekniskar avsetingar í alt / *Total technical provisions*** | **59.976** | **49.954** |
| | **Skuld / *Equity and liabilities*** | | |
| 14 | Skuld í samband við endurtrygging / *Debt related to reinsurance* | 442 | 1.159 |
| | Skattur / *Tax* | 6.801 | 5.284 |
| | Onnur skuld / *Other payables* | 3.965 | 4.895 |
| | Vinningsbýti fyri roknskaparárið / *Dividends for the financial year* | 0 | 12.000 |
| | **Skuld / *Total debt*** | **11.209** | **23.338** |
| | **Tíðaravmarkingar / *Accruals and deferred income*** | **6.282** | **14.070** |
| | **Skuld tilsamans / *Total equity and liabilities*** | **167.658** | **170.847** |

# Viðmerkingar til hálvársroknskapin / Notes to the H1 financial statements

| | | 1. hálvár | 1. half year |
|---|---|---|---|
| | DKK 1.000 | 2010 | 2009 |
| 1 | **Úrslit av endurtrygging / *Profit/loss on business ceded*** | | |
| | Latin endurtryggingargjøld / *Ceded insurance premiums* | -3.086 | -3.676 |
| | Broyting í endurtryggingarparti av avsetingum til tryggingargjøld / | | |
| | *Change in reinsurers' share of provisions for unearned premiums* | 456 | 551 |
| | Endurgoldið frá endurtryggingingini / *Reinsurance recoveries* | 354 | 826 |
| | Broyting í endurtryggingarparti av avsetingum til skaðagjøld / | | |
| | *Change in reinsurers' share of gross provisions for claims* | -566 | -1.555 |
| | Provisiónir frá endurtryggingum / *Commission from reinsurers* | 334 | 272 |
| | **Tilsamans / *Total*** | **-2.508** | **-3.583** |
| | | | |
| 2 | **Tryggingarteknisk renta f.e.r. / *Technical interest, net of reinsurance*** | | |
| | Grundarlagið fyri upphæddini er miðal primo / ultimo uppgerðir av tryggingarligum avsetingum f.e.r. við einari miðalrentu fyri lánsbrøv, ið hava eina leypitíð undir 3 ár. (1,38% fyri 2010) / *Amount calculated on the basis of average start of period/end of period statements of technical provisions, net of reinsurance, using the average yield of bonds with a term to maturity of less than three years. (2010: 1.38%)* | **391** | **682** |
| | | | |
| 3 | **Rakstrarútreiðslur av trygging f.e.r / *Total insurance operating expenses, net of reinsurance*** | | |
| | **Tekningarútreiðslur / *Acquisition costs*** | | |
| | Nýtekningarútreiðslur v. m. / *Provisions and others* | 2.672 | 2.083 |
| | Samsýning / *Commission* | 368 | 70 |
| | **Tilsamans / *Total*** | **3.040** | **2.152** |
| | | | |
| | **Fyrisitingarútreiðslur / *Administrative expenses*** | | |
| | Avskrivingar / *Depreciation* | 142 | 97 |
| | Aðrar fyrisitingarútreiðslur íroknað løn / *Other Administrative expenses incl. wages* | 5.818 | 6.483 |
| | **Tilsamans / *Total*** | **5.960** | **6.580** |
| | | | |
| | **Provisiónir frá endurtryggingum / *Commission from reinsurers*** | | |
| | Móttiknar provisiónir / *Recieved Commissions* | -334 | -272 |
| | | | |
| | **Rakstrarútreiðslur av trygging f.e.r / *Total insurance operating expenses, net of reinsurance*** | **8.665** | **8.461** |

| DKK 1.000 | 1. hálvár 2010 | 1. half year 2009 |
|---|---|---|
| **Herav: / *Of which:*** | | |
| **Gjald til grannskoðarar / *Audit fees*** | | |
| Gjald til lógásetta grannskoðan / *Statutory audit fees* | 70 | 66 |
| Aðrar veitingar / *Non-audit services* | 5 | 16 |
| | | |
| **Fulltíðarstørv / *Full-time employees*** | **23** | **22** |
| | | |
| **Starvsfólkakostnaður / *Employee expenses*** | | |
| Lønir / *Wages and salaries* | 4.597 | 4.308 |
| Eftirlønir / *Pensions* | 433 | 379 |
| Sosialar útreiðslur / *Social security* | 199 | 154 |
| Lønarhæddaravgjald / *Payroll tax* | 490 | 229 |
| **Tilsamans / *Total*** | **5.720** | **5.070** |
| | | |
| Nevnd / *Board of Directors* | 128 | 72 |
| Stjórn / *Executive Board* | 714 | 752 |
| **Tilsamans / *Total*** | **842** | **824** |
| | | |
| Skaðaviðgerðarkostnaðir fluttir til útgoldin endurgjøld / *Claims handling expenses transferred to claims paid* | | |
| **Tilsamans / *Total*** | **-3.431** | **-2.584** |
| | | |
| **Lønir og samsýningar v.m. / *Wages, salaries and others*** | **3.130** | **3.309** |
| | | |
| 4 **Rentur og vinningsbýti / *Interest and dividends, etc.*** | | |
| Renta av lánsbrøvum / *Interest on securities* | 854 | 986 |
| Renta av innlánum / *Interest on deposits* | 950 | 1.662 |
| Vinningsbýti av partabrøvum / *Dividend on shares* | 0 | 0 |
| **Tilsamans / *Total*** | **1.804** | **2.648** |
| | | |
| 5 **Skattur 18% / *Tax 18%*** | | |
| Skattur av skattskyldugari inntøku / *Tax on taxable income* | 1.472 | 2.337 |
| Javnan av útsettum skatti viðvíkjandi ársúrslitinum / *Adjustment of deferred tax related to profit for the year* | 0 | 0 |
| **Tilsamans / *Total*** | **1.472** | **2.337** |

# Viðmerkingar til hálvársroknskapin / Notes to the financial statements

| | DKK 1.000 | 30. jun. 2010 | 31. dec. 2009 |
|---|---|---|---|
| 6 | **Edv, innbúgv og bilar o.a. / *IT equipment, fittings, motorcars, etc.*** | | |
| | Útveganarvirði / *Cost* | 2.777 | 2.806 |
| | Tilgongd / *Additions* | 313 | 0 |
| | Frágongd / *Disposals* | 0 | 29 |
| | Tilsamans / *Total* | 3.090 | 2.777 |
| | Avskriving undanfarin ár / *Depreciation in previous years* | 2.276 | 2.097 |
| | Avskrivingar í árinum / *Depreciation for the year* | 142 | 179 |
| | Tilsamans / *Total* | 2.418 | 2.276 |
| | Bókað virði / *Carrying amount* | 672 | 501 |
| | Harumframt er avskrivað beinleiðis í rakstri / *Write-offs during the year* | 1.864 | 3.635 |
| 7 | **Fastar ognir / *Real property*** | | |
| | Útveganarvirði / *Cost* | 980 | 980 |
| | Uppskrivan / *Revaluations* | 1.012 | 1.012 |
| | Frágongd / *Disposals* | 0 | 0 |
| | Avskriving undanfarin ár / *Depreciation in previous years* | 0 | 0 |
| | Avskrivingar í árinum / *Depreciation for the year* | 2 | 0 |
| | Bókað virði / C*arrying amount at* | 1.990 | 1.992 |
| 8 | **Lánsbrøv / *Bonds*** | | |
| | Kursvirði við ársbyrjan / *Market value, beginning of year* | 50.189 | 46.213 |
| | Kursvirði ultimo / *Market value, end of year* | 53.880 | 50.189 |
| 9 | **Áogn hjá tryggingartakarum / *Receivables from policyholders*** | | |
| | Eftirstøður / *Delinquent premium payments* | 3.058 | 3.018 |
| | Frammanundan uppkravt / *Invoiced in advance* | 5.456 | 12.510 |
| | **Tilsamans / *Total*** | **8.514** | **15.528** |
| 10 | **Áogn hjá tryggingarfeløgum / *Receivables from insurance companies*** | | |
| | Áogn hjá endurtryggingarfeløgum / *Receivables from reinsurance companies* | 0 | 308 |
| | **Tilsamans / *Total*** | **0** | **308** |
| 11 | **Onnur áogn / *Other receivables*** | | |
| | Posta / Posta | 7 | 7 |
| | Skattaogn (støðisogn) / Tax assets (non-current assets) | 29 | 29 |
| | **Tilsamans / *Total*** | **37** | **37** |

| DKK 1.000 | **30. jun. 2010** | **31. dec. 2009** |
|---|---|---|
| 12 **Eginpeningur / *Equity*** | | |
| Partapeningur / *Share Capital* | 40.000 | 40.000 |
| | | |
| **Framflutt úrslit / *Retained earnings*** | | |
| Saldo primo / *Primo Balance* | 43.485 | 31.602 |
| Úrslit fyri tíðarskeiðið / *Result for the period* | 6.706 | 23.882 |
| Vinningsbýti / *Dividends* | 0 | 12.000 |
| Saldo ultimo / *Balance at end* | 50.191 | 43.485 |
| Eginpeningur tilsamans / *Total Equity* | 90.191 | 83.485 |
| | | |
| 14 **Avsett til tryggingarvirksemi f.e.r. / *Forsikringsmæssige hensættelser f.e.r.*** | | |
| Tryggingar felagsins hava leypandi høvuðsforfall, sum inniber, at tær einstøku tryggingarnar hvør einsæris hava gjaldingardag tann 1. í mánaðinum. Tryggingargjaldið verður antin goldið kvartárliga, hálvárliga ella árliga. / *The company's insurance policies expire in an ongoing process, which means that each individual policy will have payment dates individually on the first day of a month. The premium is paid either quarterly, half-yearly or annually.* | | |
| | | |
| **Skuld í samband við endurtrygging / *Debt related to reinsurance*** | | |
| Upphæddin er millumrokning við endurtryggingarfeløg / *The amount represents balances with reinsurance companies* | 442 | 1.159 |

# Leiðsluátekning / Statement by the Management

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og góðtikið hálvársfrágreiðingina hjá P/F Trygd fyri tíðarskeiðið 1. januar - 30. juni 2010.

Hálvársfrágreiðingin er gjørd bæði sambært kunngerð nr. 2 frá 30. desembur 2009 um fíggjarligar frágreiðingar hjá tryggingarfeløgum og sambært viðtøkum felagsins.

Vit halda, at menningin í virkseminum og fíggjarligu viðurskiftini í P/F Trygd eru rætt eftirkannað í leiðslufrágreiðingini, og at týðandi váðar og óvissutættir, sum kunnu raka felagið, verða lýstir.

Vit halda, at tann nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at roknskaparligu metingarnar eru álítandi. Vit halda eisini, at øll framløgan av hálvársfrágreiðingini vísir røttu støðuna. Okkara fatan er at hálvársfrágreiðingin gevur eina rættvísandi mynd av ogn, og skuld, og úrslitinum av virksemi og peningarensli í P/F Trygd.

Tað er ikki framd grannskoðan ella review av hálvársfrágreiðingini.

**Tórshavn, 30. august 2010**

The Board of Directors and the Management Board today considered and approved the interim report of P/F Trygd for the six months ended 30 June 2010.

The interim financial statements have been prepared in accordance with Executive Order No. 2 of 30 December 2009 on financial reports presented by insurance companies and with the company's articles of association.

In our opinion, the management's report includes a fair review of the developments and performance of the activities and financial position of P/F Trygd and describes significant risks and elements of uncertainty that it faces.

We consider the accounting policies applied to be appropriate and the accounting estimates to be reasonable. Furthermore, we find the overall interim report presentation true and fair. In our opinion, the interim report gives a true and fair view of P/F Trygd's assets, liabilities, financial position, results of operations and cash flows.

The interim report has been neither reviewed nor audited.

**Tórshavn, 30 August 2010**

Stjórn / Executive Board

Jean Djurhuus, stjóri

Nevnd / Board of Directors:

Janus Petersen
Formaður / Chairman

Jens Erik Christensen

Christian Andreasen

Niels Juul Andersen

Tummas Hanus Dam

**P/F Trygd**
**Tryggingarfelag**

Gongin 7
P.O. Box 44
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 358 100
Fax +298 317 211
trygd@trygd.fo
www.trygd.fo

**Trygd hugsar um teg**

SENDISTOVAN Svanamerktur prentlutur, 541 705